Hendur og hundur eru ey

At 39 ára gamli Uni Rasmussen er blindur, forðar honum ikki í at liva eitt vanligt og virkið lív. Seinastu tíðina hevur hann fingist við at klæða sær húsini. - Onnur skulu ikki bestemma, hvat ein blindur kann og ikki kann, er hansara motto.

LAGNAN
Rigmor Dam
Myndir: Høgni Thomsen

Vanliga varnast vit valla mannin í stiganum, tá ið hann klæðir hús síni. Men tá ið 39 ára gamli Uni Rasmussen stendur og balanserar í toppinum á smala aluminiumsstiganum upp móti hvíta húsavegginum í Norðragøtu, tá eru mong, sum steðga á, halda ondini og hugsa sítt. Tí Uni sær ikki fram fyri seg – hann er starblindur.

Trilvandi følir Uni seg fram til hvørja einastu skrúvu, sum hann tekur úr hvíta plastklædninginum. Eina fyri og aðra eftir pilkar hann gomlu pláturnar av, blakar tær niður í tún og setir vakran cognaclittan við upp í staðin.

Ein kaldur marsmorgun í '90 gjørdist lagnudagur hansara. Uni og bróðurin vóru á veg til Havnar, har hann gekk í skúla, tá ein hvirla tók bilin. Forrúturin fór í smildur og mongu glaspettini vórðu atvoldin til, at Uni, longu sum 21 ára gamal, misti sjónina fyri lívið. Men hóast myrkrið fyri eina stund tóktist vinna á ljósinum, kundi onki taka lívsviljan frá unga søldfirðinginum.

> *Tað, at eg eri blindur, skal ikki forða mær í tí, sum eg havi hug til. Eg royni meg bara fram, og miseydnast tað, so biðið eg um hjálp, sigur Uni*

Fyri hálvum fjórða árum síðani giftist hann inn til Emmu í Norðragøtu, har hann nú er partur av einari familju við trimum skúlabørnum, 9, 12 og 13 ára gomul.

- Eg tori næstan ikki at hyggja at, tá ið hann klívur upp í stigan og arbeiðir uppi í hæddunum, sigur Emma brosandi, nú Uni er farin at klæða húsini av nýggjum. Men sjálvandi er hon eisini errin av manninum.

Trilvandi gjøgnum dagin

Uni er minst líka virkin sum ein vanligur 39 ára gamal føroyingur. Hendurnar eru rætt skrúvaðar á, og við einari fortíð sum bilmekanikari, teldusnillingur og seinni eisini útlærdur massørur ber næstan alt til.

- Tað einasta, sum eg sakni, er at kunna ganga fjøllini sum ein frælsur maður, sigur Uni, sum annars luttekur í øllum arbeiði, inni sum úti: fletting, at royta fugl, hagreiða grind og at røkja kríatúrini á trøðni norðanfyri í bygdini.

- Tað løgnasta var at skula læra at eta við knívi og gafli av nýggjum. Hvussu kennist eitt epli ella ein kjøtbiti at prika í, og hvussu nógv vigar eitt passaligt petti á gaflinum? greiðir Uni frá, nú vit sessast um hugnaliga køksborðið, har Emma hevur dekkað upp. Og meðan prátið gongur, verða vit førd inn í ein heim, har hendur og hundur, saman við hinum sansunum, virka sum eygu Una. Og nógv er, sum vit síggjandi ikki hugsa um í gerandisdegnum. Til dømis brúkar ein blindur nógva orku til at minnast, hvar alt liggur.

- Tað nyttar onki, um onkur bara tveitir okkurt frá sær, til dømis eitt amboð onkrastaðni í garasjuna. Eg má hava greitt at vita, hvar alt verður lagt, annars finni eg tað ikki aftur, sigur Uni.

Treiskur og áhaldandi

Vit eru mong, sum kundu lært nógv av Una, tí hann sær heldur møguleikarnar enn forðingarnar.

- Tað, at eg eri blindur, skal ikki forða mær í tí, sum eg havi hug til. Tað er bara at fara í gongd og at royna seg fram. Tað er eisini ymiskt, hvat síggjandi duga. Og eg eri ikki bangin fyri, at tað skal miseydnast. So royni eg bara um aftur, og riggar tað ikki, so má eg bara biðja um hjálp, sigur hann og staðfestir avgjørdur:

- Eg plagi at siga, at onnur